# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV@
SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Góðtaka ikki brotsgerðir móti mannaættini

Umsíðir tykist bilbukt verða fingin við stríðnum í Miðeystri – í øllum førum fyribils. Tað er kortini ótrúligt, og púra óakseptabult, at lond skulu sleppa at skjóta og bumba hvønnannan so leingi, áðrenn heimssamfelagið leggur uppí.

ST felagsskapurin tykist ikki serliga stinnur at loysa slík stríðsmál, í øllum førum ikki so leingi, sum heimspolitiið, USA, ikki vil verða við.

Vit taka so mangan til, at illgerðirnar móti mannaættini, sum fóru fram t. d. undir øðrum heimsbardaga ikki eiga at endurtaka seg. Vit ganga eisini runt og halda, at tað var nakað, sum bara kundi henda tá.

Men soleiðis er støðan als ikki. Heimurin upplivir dag og dagliga slík stríð, sum áttu at verið steðgað við brestin. Vit høvdu eisini eitt stríð mitt í Evropa í nítiárunum – tá Balkan stóð í ljósum loga. Fólk vórðu dripin frá hond, uttan at heimssamfelagið so ella so legði uppí og steðgaði illgerðunum við brestin. Slíkt eigur ikki at kunna henda!

Í slíkum føri átti ST at lagt uppí beinanvegin. Tað kann ikki verða rætt, at so krígshugað fólk, sum vit síggja ráða í fleiri londum – eisini sokallaðum siviliseraðum londum – sleppa at sita við valdið, tá slíkar støður taka seg upp. Her átti ein yvirnationalitetur, sum ST, beinanvegin at lagt uppí og steðga stríðnum. Tí áttu Ísrael og Hisbollahfelagsskapurin ikki at sloppið at bumbað hvønnannan í vikuvís við so nógvum ósekum offrum.

Vit taka ikki dagar ímillum, hvør er rættvísur og órættvísur í hesum føri. Tað kann vera líka mikið – vit halda bara, at heimssamfelagið ikki er nóg væl skipað, tá slík stríð kunnu halda fram í vikuvís – og hundraðtalsfólk liggja eftirá – áðrenn lagt verður uppí og meinaleysu brotsgerðirnar móti mannaættini verða steðgaðar.

Víst er tað, at heimspolitikararnir hava nógv at læra!

**Sosialurin**

# Dimmalætting og »Vesturheimsins fíggindar«

**ANNA MARIA JOENSEN**
Velbastaður

Eftir tíðindi um, at MI 5 og onnur antiterror-korps eydnaðust at fyribyrgja eini ætlaðari hópdrápsroynd í Onglandi herfyri, eydnaðist tó ongum á Dimmalætting at frásortera ein ónuanceraðan leiðara frá 11/8-06 við heitinum“Vesturheimsins fíggindar”.

Tað er bæði rætt og gott at ilskast inn á - og harmast um - terrorismu. Men sum fjølmiðil eigur mann – eisini í einum leiðara - at taka ta ábyrgd á seg at spyrja so nuancera, at mann ikki kemur at generalisera og foreinkla menniskju, søgu, politik og makt, og harvið geva eina reingja myndina.

Tað allar lættasta er at taka frástøðu frá fløktum málum og siga “vit” og “tey”. At spæla uppá fremmandaangist og mana eitt monstur upp úr gólvinum, sum elvir til forfylging, rasismu, religiónskríggj og sjálvsókni.

Leiðarin “vesturheimsins fíggindar” málar við so grovum pensli, at alt ov fá aspektir koma við. Hugt verður eftir religiónini islam “í sjálvum sær” (!!!) sum orsøk til terrorismu. Eisini etniskur uppruni verður skírdur at vera avgerandi. Beinleiðis endurgivið stendur einastaðni.....”Men ongantíð fyrr hava vit upplivað, at slík fólk hava ætlanir um atsóknir, sum beinleiðis eru ein vandi móti kristnu mannaættini. Tí vilja vit pástanda, at tað er islam, sum trúgv, ið ávarast nú má ímóti. Hvussu ber tað til, at slíkir ungir menn kunnu brúka teirra trúgv til at vilja drepa menniskju í hópatali? Hví skulu teir sleppa at halda, at teir uppnáa frelsu við at lata blóð flóta? Her er eitthvørt grundleggjandi galið við trúnni ella mentanini”.

Tann málaða myndin av okkum sum “kristin mannaætt í vesturheiminum” sum hevur roynt at skilja hesi fólk (øll yvir ein kamb) vil eg ikki koma inn á annað enn at siga, at løgið er at royna at polarisera kristindóm mótvegis islam sum svar uppá terrortrupulleikan. Tað er jú ikki kristindómur sum verður havdur á lofti, tá USA og onnur vesturlond verða kritiserað. Tað er oftast tann førdi politkkurin innan oljuhandil, herseting, fígging og stuðul til lokalar bólkar, sum verður nevndur, eitt nú Irak, Kuwait ella Libanon.

Vit vita, at heimurin broyttist eftir at múrurin millum eystur og vestur fall. Tað at koloniir og hersett lond fingu frælsi ella sjálvstýri, hevur ført til ófrið og kríggj nógvastaðni, serliga innanhýsis, eitt nú í Russlandi, á Balkan, í Afrika, v.m.

Nationalisman slapp leys uttan demokratisk stýrisamboð (og ST stuðul). Nationalisman hevur eisini ávirkað mótvegis eini politisering av fundamentalistiskum tulkingum av islam. Hetta hevur so ført til, at fleiri bólkar legitimera terrorismu sum politiskt amboð, harímillum Al Qaida. (Men eisini vesturlond, sum siga seg vera demokratisk og hava demokratisk stýrisamboð hava uppreistrarbólkar, IRA í Írlandi og ETA í norðurspania hava dripið hópin av sivilum.)

Fyrr kundi USA og EU halda kríggj ella ósemjur burturi frá egnum øki í størri mun enn nú.Vit øll eru vorðin meiri sárbar grundað á, at sivilir borgarar eru vorðnir mál og ikki bert hermenn. Terroristar arbeiða uppá tvørtur um landamørkum og draga “fjarar ósemjur” inn á okkara dyr, vit sivilu borgarar tvingast til at taka støðu til konfliktir, sum fyrr vóru “aðrastaðni”.

Við vápnatøkni, fylgissveinum, fjølmiðlatøkni, og ikki minst alnótini - eru nýggir møguleikar komnir, eisini hjá terroristum. Eggjaðir av globalum sjónvarps- og tíðindaflutningi er “mediekríggj” ein skjótur máti at síggja úrslit av sínum handlingum.

Kofi Annan, ST aðalskrivari sigur á ST heimasíðuni www.un.org/news/ tann 14/8-06 soleiðis um at basa terrorismu: “Allir statir í øllum regiónum – stórir ella smáir, sterkir ella veikir - eru sárbarir mótvegis terrorismu og tí sum herav fylgjur. Tað kann loysa seg hjá øllum londum at vera við at gera eina mótterrror strategi. Øll hava ein leiklut í at skapa eina tílíka strategi”, leysliga umsett.

So ístaðin fyri at sundurbýta heimin í eina vesturlendska, kristna mannaætt, og “hini”, er tað kanska rættari at hyggja at, hvussu alheimsgerðin broytir háttin at føra politikk uppá. Vit eru ikki longur staðbundin, eru í fleiri førum bert ein e:mail frá hvørjum øðrum. Hetta krevur eitt neyvari, meira tolerant og positivt samstarv millum heimsins lond, har tann nýggja uppgávan verður at sleppa undan kontrolsamfelagnum sum avloysari fyri demokrati. Eisini er neyðugt við miðvísum arbeiði mótvegis xenofobi og intolerancu í privatum og almennum høpi.....og í fjølmiðlunum.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.
Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.